Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri:

# - Heðin hevur sjálvur sovið í tímanum

**Í grein í blaðnum í gjár segði Heðin Mortensen, borgarstjóri, at núverandi samgonga noyðist at rudda upp í svansinum eftir farnu samgongu. Fyrrverandi borgarstjórin, Jan Christiansen, skilur ikki hesar atfinningar og vísir á, at Heðin Mortensen sjálvur var varaborgarstjóri í farnu samgongu, og harumframt var hann formaður í byggi- og býarskipanarnevndini**

BÝRÁÐIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Jan Christiansen segði í gjár, at hann einki hevði sæð til tilboðið um at keypa Degnshús fyri fýra árum síðani, og hann heldur, at kanska er tilboðið endað á borðinum hjá táverandi formanni í byggi- og býarskipanarnevndini, Heðin Mortensen, sum ikki hevur latið við seg koma.

### Okkurt er gloppið hjá Heðin

- Heðin finst at farnu samgongu, ið skal hava lagt alt møguligt svans eftir sær. Sjálvur var Heðin varaborgarstjóri og formaður í byggi- og býarskipanarnevndini hetta tíðarskeið, og tí hevði hann allar møguleikar at rætta upp á tað, um hann metti, at okkurt var galið. Fyri mær tykist tað sum um, at okkurt er gloppið hjá Heðin Mortensen, sigur Jan Christiansen.

Fyrrverandi borgarstjórin vísir á, at í farna valskeiði legði táverandi andstøða nógv eftir samgonguni, og í flestu førum var talan um ákærur fyri byggisvans.

- Vit fingu ábreiðslur fyri eitt nú heimið í Vallalíð og smábarnaskúlan í Kongagøtu, og tað eru jú byggimál, og Heðin Mortensen var jú formaður í byggi- og býarskipanarnevndini, sum hevði hesi mál um hendi, greiðir Jan Christiansen frá.

Somuleiðis sigur Jan Christiansen, at hann er vitandi um, at Heðin Mortensen, sum formaður í byggi- og býarskipanarnevndini, á fundi við fyrrverandi eigara av Degnshúsi segði viðkomandi eigara, at tað ikki fóru at verða nakrir trupulleikar við at fáa byggiloyvi til skrivstovubygning, og at ongar forðingar fóru at verða fyri hesum.

Í sambandi við keypið av Degnshúsi sigur Jan Christiansen, at nú er vandi fyri, at býráðið noyðist at keypa fleiri ognir í miðbýnum fyri dýrar pengar.

- Nú kunnu t.d. eigararnir av gamla handilsbygninginum hjá Jacob Lützen gera eina ætlan um at gera ein líknandi skrivstovubygning, sum ætlanin var at byggja, har Degnshús standa. Bygningurin á ognini hjá Jacob Lützen kann tó verða væl størri, tí ognin er nógv størri enn ognin við Degnshúsi. Skal býráðið so eisini keypa hesa ogn, so noyðist teir kanska at gjalda eini 15-20 milliónir krónur fyri hana. Býráðið kann heldur ikki siga nei til at keypa, um tað skuldi verið, tí kommunulógin sigur, at allir borgarar skulu fáa somu viðferð, sigur Jan Christiansen at enda.



*Jan Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri, skilur ikki atfinningarnar hjá Heðin Mortensen í blaðnum í gjár og vísir á, at Heðin Mortensen sjálvur var varaborgarstjóri í farnu samgongu og formaður í byggi- og býarskipanarnevndini, sum fekk flestu ábreiðslurnar í farna valskeiði.*

# Eldraráðið takkar fyri stuðulin

Tann 29. november var nýtt eldraráð valt á fyrsta sinni í Tórshavnar býráð. Eldraráðið skal ráðgeva býráðnum í málum, ið viðkoma teimum eldru.

Tað nývalda Eldraráðið í Tórshavnar kommunur takkar fyri stóru luttøkuna til valið.

- Hetta vísir áhugan millum pensjónistar fyri tí, sum hendir í okkara viðurskiftum, sigur Marita Arge Magnussen, sum er forkvinna í eldraráðnum.

Nevndin takkar teimum, sum stuðlaðu teimum persónliga og ynskir øllum eini gleðilig jól.




*Í Eldraráðnum sita: Marita Arge Magnussen, Elingborg Trónd Johansen, Suni Vinther, Jákup Lindenskov og Poula Apol*

Hertz®

**Bil um jólini...**

Dømi:
*Ford Fiesta ella VW Polo*

3 dagar **kr. 900,-** *íroknað 400 km.*
7 dagar **kr. 1.900,-** *íroknað 1.000 km.*



TEAM85

Hertz®
Hoydalsvegur 17 · tel 34 00 42
Flogvøllurin · tel 34 00 60
Fartel 21 35 46 / 21 10 25








21. desember
Kl. 15.00 Jólamenninir koma ríðandi oman á Kongabrúnna og gjøgnum býin
Kl. 18.00 Frelsunar Herurin spælir í gongugøtuni
Kl. 19.00 Kórið Cantabile syngur runt um í býnum

22. desember
Kl. 16.00 Havnar Ungdómshornorkestur spælir í gongugøtuni
Kl. 18.00 Kórið Glymur syngur í gongugøtuni

23. desember
Kl. 18.00 Kórið Cantabile syngur í gongugøtuni
Kl. 19.00 Havnar Hornorkestur spælir í Dr. Jakobsens gøtu

**Jólamenninir verða í býnum hvønn seinnapart frá 17. til 23. desember**
Ì jólavikuni frá 17.-23. desember hava handlarnir opið
17.-21. desember til kl. 20.00 og
22. og 23. desember til kl. 21.00
Handilskjarnin hevur tó opið 23. desember til kl. 22.00
Jólaaftan hevur Frants Restorff opið frá 6.30 til 12.00
og afturlatið 1. og 2. jóladag.

